Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Uni Rasmussen, løgtingsmaður

Svarari: Magnus Rasmussen, landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum

Evni: Verkfall og tey veikastu í samfelagnum

Spurningar:

1. Hvussu gongst hjá landsstýrismanninum í arbeiðinum at tryggja, at tey veikastu í samfelagnum ikki verða rakt av møguligum verkføllum í framtíðini?
2. Hvørja ætlanir hevur landsstýrimaðurin fyri at koma á mál hesum viðvíkjandi?

Viðmerkingar:

Undanfarin ár, tá verkføll hava verið á almenna arbeiðsmarknaðinum, hevur nógv verið tosað um, at vit skulu fáa skipanir, sum tryggja, at tey veikastu í samfelagnum ikki verða rakt av verkføllunum. Undanfarni landsstýrismaðurin á økinum segði seg fara at arbeiða fyri at fáa eina semju við partarnar á arbeiðsmarknaðinum, soleiðis at tey veikastu í samfelagnum ikki verða rakt av framtíðar verkføllum.

MEGD hevur millum annað víst á, at tey høvdu ynskt, at brekøkið lá uttan fyri rakt øki, tá ið verkfall rakar samfelagið. MEGD vísir á, at tað ikki eigur at endurtaka seg, at tey, ið búgva á stovnum og líknandi fyriskipanum verða flutt til avvarðandi at vera, at ymisku skipaninar, ið veita fólki, ið bera brek, ein nøktandi gerandisdag, verða raktar – sama við náttarvakt og at næmingar á serstovum ella serdeildum á skúlum sleppa í skúla eins og javnaldrarnir v.m.

Ynskiligt er eisini, at mest týðandi virksemi á sjúkrahúsunum v.m. ikki verður rakt av framtíðar verkføllum.

Vit skulu virða tann fría samráðingarrættin á arbeiðsmarknaðinum, men tað er tó av týdningi, at vit fáa eina semju við partarnar á arbeiðsmarknaðinum, soleiðis at tey veikastu í samfelagnum ikki verða rakt av framtíðar verkføllum. Til undanfarin verkføll á almenna arbeiðsmarknaðinum hevur verið nevnt, at tað er í friðartíð, at slík viðurskiftir skulu koma uppá pláss, og tískil er løtan tann rætta at fáa hetta uppá pláss. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 1. november 2021

Uni Rasmussen